TILMÆLI

til

Fiskimálaráðið

frá

Metingarnevndini viðvíkjandi Menningarkvotum av makreli, norðhavssild og svartkjafti

**Grundarlagið fyri arbeiðinum**

Við heimild í "Kunngerð um menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til menningarætlanir í ávísum økjum 2019", setti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í skrivi 8 mars 2019, hesa nevnd at viðgera og gera tilmæli um útlutan av menningarkvotum: Gestur Hovgaard (formaður), Arnbjørn Egholm (næstformaður), Guðrið Andorsdóttir, Rúna Hjelm og Bartal Dulavík. Sum tiltakslimir vórðu vald Mathea Hilduberg og Eyðun Leo. Barbara á Tjaldrafløtti hevur virkað sum skrivari hjá nevndini.

Nevndin hevði sína fyrsta fund tann 08 mars 2019. Á hesum fundi vóru formligu viðurskiftini gjøgnumgingin, harundir broytingarnar í kunngerðini fyri 2019 í mun til 2018. Munandi broytingin er tann, at í heildarmetingini, skal størstur dentur leggjast á demografisku avbjóðingarnar í økinum, t.e. arbeiðsloysi og støðugt minkandi fólkatal í tí økinum verkætlanin skal fara fram í mun til onnur øki í landinum.

Tøka nøgdin til útlutan í 2019 er 11.711 tons av svartkjafti, 3.159 tons av makreli og 4.695 tons av norðhavssild. Talva 1 niðanfyri er eitt yvirlit yvir tøku nøgdina í 2019, umframt munin millum tøku nøgd og søkt í tonsum og lutfalsliga.

**Talva 1**: Yvirlit yvir nøgdir at ráða yvir, tonsatal søkt er um og munurin millum hesi í tonsum og í %.

| Fiskaslag | Tonsatal at ráða yvir | Tonsatal søkt er um | Munur millum søkta nøgd og nøgd at ráða yvir í tons. | Tøka nøgdin í % av søktum tonsatali |
|---|---|---|---|---|
| Svartkjaftur | 11.711 | 154.665 | 142.954 | 7,6 % |
| Makrelur | 3.159 | 58.115 | 54.956 | 5,4 % |
| Norðhavssild | 4.695 | 57.002 | 52.307 | 8,2 % |

Talvan vísir greitt, at søktar eru um munandi størri nøgdir, enn tøka nøgdin, ið er til útlutan.

Nevndin hevur móttikið og viðgjørt 37 umsóknir, ið umfata øll øki í landinum, og fleiri umsóknir eru úr hvørjum øki. Eisini eru umsóknir, har verkætlanin umfatar fleiri øki.

Nevndin skal ikki meta um, hvørt umsøkjarar uppfylla treytirnar í §11, §11 stk. 2 og §11 stk. 3 í kunngerðini. Hendan uppgávan áliggur Fiskimálaráðnum.

**Tilmæli**

Av teimum íalt 37 umsóknunum, mælir nevndin til at 6 umsóknir fáa tillutað menningarkvotu. Hesir umsøkjarar, økini virksemið umfatar, nøgdir fyri 2019 og áramál verður lýst í talvu 2 niðanfyri.

| **TALVA 2:** tilmælt menningarkvotu 2019, øki, tons og áramál | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Umsøkjari** | **Øki** | **Svart-kjaftur Tons** | **Makrel Tons** | **Sild Tons** | **Áramál** |
| P/F Thor og P/F Sandoy Seafood. | 2 | | 500 | 1.000 | 1 |
| P/F Vørðustíggjur (Eysturbúgvin). | 2 | | 500 | 1.000 | 1 |
| P/F North Atlantic Seafood. | 1 | 5.500 | 0 | 0 | 1 |
| P/F TG Fish, P/F Steintór og P/F Jókin. | 1 | 4.711 | 1.259 | 2.000 | 1 |
| P/F Defa. | 1 | 1.500 | 500 | 195 | 1 |
| P/F Delta Seafood. | 1 | | 400 | 500 | 1 |
| Samanlagt tons: | | 11.711 | 3.159 | 4.695 | |

Kunngerðin sigur, at í minsta lagi 25% av kvotuni skal latast sum 1 ára loyvi, t.e. 13.033 tons tilsamans, meðan mongdin, sum er at lata til 2, 3 ella 4 árs kvotur er 6.532 tons, harav svartkjaftur er 3077 tons, sild 2046 tons og makrelur 1409 tons.

Av tí at so smáar nøgdir eru at lata yvir meira enn 1 ár, metir nevndin í 2019 rættast vera, einans at lata kvotu fyri 1 ár. Ein yvirskipað orsøk til tað er, at viðmælisverdar verkætlanir yvir fleiri ár, eru grundaðar á eitt tonsatal, sum er samsvarandi ella væl størri enn tøka nøgdin, ið er at lata. Við verandi tøku mongd, og tí hesar umsóknir krevja rættuliga stórar íløgur, hevur nevndin ikki mett tað ráðiligt at tilmæla nakrar av hesum størri umsóknum, hóast kanska áhugaverdar. Í síni heildarmeting hevur nevndin valt at raðfesta umsóknir sum krevja færri íløgur og hava eftir umstøðunum skjóta økisrættaða ávirkan. Nevndin hevur tó, í onkrum føri mælt til partvísa játtan innanfyri eina størri verkætlan, har hetta eftir okkara meting letur seg gera, harundir fyri at styrkja virksemi og førleikamenning í øki 1 og øki 2.

Talan er um tilmæli til verkætlanir við virksemi í Sandoynni (øki 2) og Suðuroynni (øki 1). Hetta hongur í stóran mun saman við avmarkaðu tøku nøgdini og herðing í kunngerðini um, at demografisku avbjóðingarnar skulu hava serligt uppmerksemi í viðgerðini. Hagtølini nevndin hevur havt sum grundarlag undir sínum arbeiði vísa greitt, at serliga stórar demografiskar avbjóðingar eru í Suðuroynni og á Sandoynni. Fleiri viðmælisverdar umsóknir eru komnar við støði í hesum økjum.

Nevndin hevur ta fatan, at lítil atgongd til sjófeingi, hevur serliga stóran týdning í mun til økisrættaðu atlitini, tí atgongd er ein fortreyt fyri at skapa munagóða menning, eisini tá talan er um 'øki í økinum'.

Umframt økisatlit skulu virkisrættaði atlit takast, t.e. hvussu nýskapandi ætlanin er, førleikamenning og hvussu stórar inntøkur og virðisøking ætlanin gevur. Tilmæltu kvoturnar byggja á ein ymiskleika í verkætlanum, bæði viðvíkjandi fiskiskapi og hagreiðing á landi, sum nevndin metir tað vera rætt at royna. Hesar umsóknir vísa harumframt til høli og virki í økinum, sum kunnu takast í nýtslu uttan

stórvegis íløgur, og sum ífylgi ætlan eisini kunnu geva eitt relativt skjótt avkast og økisárin, t.e. arbeiði og førleikamenning.

Atlitini kring virkisrættaðu og økisrættaðu treytirnar skulu, sambært §6 í kunngerðini, lýsast nærri av umsøkjarunum sjálvum. Tó *kann* nevndin seta seg í samband við umsøkjara, um hon heldur tað vera neyðugt. Nevndin hevur ikki valt at seta seg í samband við umsøkjarar, tí umsóknirnar skulu í prinsippinum bera seg sjálvar.

Skjal 1 í kunngerðini ger greitt, at viðgerðin hjá nevndini *skal* byggja á eina *heildarmeting* av menningarætlanini og verkætlanini. Tá økis- og virkisrættaðu atlitini verða sæð í einari heild, eru tað ásettu atlitini til burðardygga og varandi samfelagsliga menning nevndin hevur hildið seg til at meta um, men sum nevnt, við serligum denti á demografisku viðurskiftini.

Hvør einstøk umsókn er sostatt mett út frá einum økisrættaðum og einum virkisrættaðum atliti, umframt eini heildarmeting, soleiðis sum lýst er omanfyri. Harumframt hevur, sum longu nevnt, verið neyðugt at samanbera dygdirnar í bestu umsóknunum og viga hesar í mun til ásetingarnar í kunngerðini.

Við støði í hesum almennu grundgevingum, byggir nevndin sínar niðurstøður á ítøkiliga viðgerð av hvørjari umsókn sær.

**Arbeiðsleistur**

Nevndin hevur tilsamans havt 8 formligar nevndarfundir, og millum fundirnar javnan hitst á arbeiðsfundum til tess at hava felags viðgerð av umsóknunum. Harumframt eru arbeiðsuppgávur býttar út at loysa millum fundirnar. Allir nevndarlimir hava sett seg inn í hvørja einstaka umsókn.

Til at meta um ymisku atlitini, hevur nevndin gjørt serstakt metingarblað, sum er við til at tryggja, at allir umsøkjarar fáa neyva og javnbjóðis viðgerð. Nevndin hevur í ávísum førum biðið um serkøna hjálp, eitt nú í mun til sølu- og handilsviðurskifti, hagtøl og lógir. Talgrundarlagið undir arbeiðinum hjá metingarnevndini er fingið til vega frá Fiskimálaráðnum, t.e. tøl viðvíkjandi arbeiðsloysi, atgongd til tilfeingi og demografisku støðuna.

Ásetingarnar um menningarkvotur, eru við til at seta gongd á eina nýggja skipan, har royndirnar frá 2018 hava verið virðismiklar. Arbeiðið í nevndini hevur gingið væl, har ymisku førleikar okkara hava stuðlað undir eitt gevandi samstarv, og arbeitt er fram eitt greitt og felags forstáilsi av uppgávuni.

Tórshavn tann 03. mai 2019

Metingarnevndin viðvíkjandi Menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti

Gestur Hovgaard, formaður

Guðrið Andorsdóttir, nevndarlimur

Arnbjørn Egholm, næstformaður

Rúna Hjelm, nevndarlimur

Bartal Dulavík, nevndarlimur